# Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**



Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo



Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

Oyggjablaðið í næstu viku:
**Svínoy**

## Hesaferð: Sandoy

**Hetta Oyggjablaðið hevur Sandoynna í fokus. Lesið í hesum blaðnum:**

**Síða 14:** Stubbar úr Sandoynni

**Síða 16-17:** Fríðgerð mátti bara skriva ein sang

**Síða 18:** Skeiðsdepilin liðugur í mai

**Síða 19-21:** Anna skapar nýggja tilveru á Skarvanesi

**Síða 22-23:** Ung fólk flyta til Húsavíkar

**Síða 24:** Børnini hugna sær

**Síða 26-27:** Gunnvá vil hava fleiri til Húsavíkar



MINKAR

*Skopun hevur eisini merkt til afturgongdina í fólkatalinum. Her búgva í dag 486 fólk*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 1313 í oynni

**FÓLKATAL** Tey seinastu árini er fólkatalið á Sandoynni minkað ár undan ári, og í dag eru tey 1313.

Afturgongdina hevur ein í roynd og veru kunnað staðfest síðani 1985, við hagtølum frá Hagstovuni.

Hetta árið búðu 1682 fólk á Sandoynni, og er hetta størsta talið hesi seinastu 25 árini.

Okkurt árið er talið minkað, fyri síðani at vaksa árið eftir, men sandoyingar mugu tíverri ásanna, at fólkatalið í dag er tað lægsta nakrantíð í nýggjari tíð.

Øll tosa tey um og ynskja sær av hjarta, at undirsjóvartunnilin til Sandoynna gerst veruleiki.

Tá málið hevur verið fyri á tingi hava fólk verið sera bjartskygd um framtíðina í oynni, men líkaso skjótt sum málið er dottið niðurfyri aftur, minkar hetta.

Vónir eru tó um, at hetta neyðuga ferðasambandið gerst veruleiki einaferð í framtíðini.

Tað er helst so sum borgarstjórin í Húsavík tekur til aðrastaðni í blaðnum:

- Eg vil siga, at vit kunnu bíða eftir tunlinum í 10 ár. Men ikki longur enn tað.

- Kemur hann seinni enn tað, er tað ein spurningur um hann ikki kemur ovseint. Hetta er í øllum førum eitt mál sum hevur skund, sigur Jákup Martin Sørensen.

snorri@sosialurin.fo